FISKIMÁLARÁÐIÐ

Tórshavnar kommuna
Postsmoga 32
110 Tórshavn

**Stjórnarskrivstovan**
23. september 2014
Mál: 14/00488-8
(at tilskila í svari)

Viðgjørt: kph

Tygara skriv: 14/02888-9

***Góðkenningarskriv***

**Viðvíkjandi broyting í serstøku byggisamtyktini fyri Marknagil**

Eftir reglunum í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 19 frá 18. mars 2013, hevur Tórshavnar kommuna sent Fiskimálaráðnum uppskot til broyting í serstøku byggisamtyktini fyri Marknagil góðkenningar.

Broytingin snýr seg um, at tann planeraði parturin av øki II til ítróttarbygging verður broyttur til øki III, miðstaðar- og bústaðarbygging, sum m.a. gevur rúm til skúlabygging, meðan restin av øki II framhaldandi veður til ítróttarbygging.

Sagt verður frá, at Fiskimálaráðið við heimild í § 4 í býarskipanarlógini, góðkennir broytingina í serstøku byggisamtyktini fyri Marknagil.

Víst verður eisini til ætlanarskrivið frá Fiskimálaráðnum, dagfest 26. august 2014.

Mint verður á, at hóastbroytingin í byggisamtyktini er góðkend av Fiskimálaráðnum, so frítekur tað ikki kommununi at fáa til vega møguligar aðrar góðkenningar frá øðrum myndugleikum.

Hjálagt er rættað kortskjal við átekning frá Fiskimálaráðnum.

Vinarlig heilsan

Ólavur J. Hansen
løgfrøðingur

Ministry of Fisheries
Yviri við Strond 15 • P.O. Box 347 • FO-110 Tórshavn • Faroe Islands
Tel. (+298) 35 30 30 • Fax (+298) 35 30 35 • fisk@fisk.fo • www.fisk.fo

## SERSTØK BYGGISAMTYKT FYRI MARKNAGIL

Við heimild í 4, stk. 1, í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, verður ásett:

### § 1. ØKIÐ SAMTYKTARINNAR

Økið, ið serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, er avmarkað, sum sýnt er á viðfesta kortskjali er matr. 917, 918a, 918b, 918c, 918d, 918e, 918f, 919a, 919b, 919c, 1099, 1100, 1101, 1102a, 1102b, 1102c, 1104d, 1173a, 1173b, 1173c, 1174 og 1177.

### § 2. FRÁGREIÐING UM ØKIÐ

Stk. 1. Endamálið við hesi serstøku byggisamtykt er at skipa økið við Marknagil til miðnámsskúla, fólkaskúla, ítróttarbygging og miðstaðarbygging/bústøðum og hartil hoyrandi veganet, parkeringspláss og fríøkið.

Stk. 2. Økið er avmarkað av Marknagilsvegnum, Landavegnum, útstykkingin í Svanga og útstykkingini við Perskonugøtu, og er uml. 187.000 m$^2$ til støddar.

Stk. 3. Sambært almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu liggur økið í umráðispørtunum C3 (miðstaðaendamál, skúlar, almennar stovnar og íbúðir), D1 (almenning, náttúrufriðingar- og mentunarlig endamál og tílíkt), D2 (ítróttur) og D3 (stórir almennir stovnar fyri umsiting, skúlaskap, heilsurøkt og tílíkt).

### § 3. NÝTSLA ØKISINS

Økið verður sundurbýtt í eindirnar Ia, Ib, II, III og IV.

*Stk. 1.* Eindin Ia Skúladepil

a) Eindin skal nýtast til skúladepil til tekniska skúla, handilsskúla, studentaskúla og HF-skeið og onnur undirvísingarendamál.

*Stk. 2.* Eindin Ib, Fólkaskúli

a) Eindin skal nýtast til fólkaskúla.

Stk. 3. Eindin II ítróttarendamál

a) Eindin skal nýtast til ~~ítróttarendamál~~ítróttarhøll

*Stk. 4.* Eindin III, Miðstaðar- og bústaðarbygging

a) Eindin skal nýtast til miðstaðarendamál, t.e. handlar, smærri stovnar, skúlar, skrivstovuhøli, ráðleggingarvirki og tænastuvirki ið hava samband við hetta og bústaðir.

*Stk. 5.* Eindin IV, Alment frílendi/alment endamál

a) Eindin verður í síni heild løgd út til náttúru og mentunarlig endamál og tílíkt.

## § 4.VEGIR OG PARKERING

Stk. 1. Vegatgongd og vegir í økinum

a) Atgongdin til økið er frá Marknagilsvegnum eftir atkomuvegum 1 og 2, og frá Landavegnum eftir atkomuvegi 3.
b) Atkomuvegir skulu verða í minsta lagi 10 m íroknað 2 m gongubreyt í báðum síðum.
c) Bylingsvegir skulu verða í minsta lagi 9 m íroknað 2 m gongubreyt í báðum síðum
d) Seyrugøta skal verða í minsta lagi 5 m.

Stk. 2. Parkering í økinum

a) Parkering í økispartunum Ia og Ib verður skipað eftir eini heildarmeting sambært viðfesta korti.
b) Parkering í økispartunum II og III skal skipast eftir galdandi reglum

## § 5. BYGGING, STØDD, STAÐSETING OG SNIÐ HÚSANNA

Stk. 1. Eindin Ia Skúladepil

a) Byggistigið innan fyri eitt náttúrliga avmarkað øki má ikki fara uppum 0,25
b) Nettonýtslustigið innan fyri eitt náttúrliga avmarkað øki má ikki fara uppum 0,30
c) Sum grundarlag til útrokning av byggi- og nettonýtslustigið, kann eindin IV (Alment frílendi) roknast við sum partur av náttúrliga avmarkaða økinum.

*Stk. 2.* Eindin Ib, Fólkaskúli

a) Byggistigið innan fyri eitt náttúrliga avmarkað øki má ikki fara uppum 0,25

b) Nettonýtslustigið innan fyri eitt náttúrliga avmarkað øki má ikki fara uppum 0,30

Stk. 3. <u>Eindin II ítróttaendamál</u>

a) Byggistigið innan fyri eitt náttúrliga avmarkað øki má ikki fara uppum 0,25
b) Nettonýtslustigið innan fyri eitt náttúrliga avmarkað øki má ikki fara uppum 0,30

*Stk. 4.* <u>Eindin III, Miðstaðar- og Bústaðarbygging</u>

a) Byggistigið fyri økispartin má ikki fara upp um 0,4
b) Nettonýtslustigið fyri økispartin má ikki fara upp um 0,5

*Stk. 5.* <u>Eindin IV, Alment frílendi/alment endamál</u>

a) Á eindin IV skal ikki verða bygt

## § 6. ÚTSJÓND HÚSANNA

Øll bygging í økinum, sum serstaka byggisamtyktin fevnir um, skal gerast í samráð við byggivaldið.

*Stk. 2.* Kommunan skilar sær rætt til at seta krøv til útsjónd av bygningum í sambandi við út- og umbygging ella nýbygging.

## § 7. BYGGIMYNDUGLEIKI OG ÁTALURÆTTUR

Byggimyndugleiki og átalurættur eru sambært hesi byggisamtykt hjá Tórshavnar býráð einsamøllum.

## § 8. UNDANTAKSLOYVI FRÁ BYGGISAMTYKTINI OG BROYTINGAR

Smávegis lættar frá reglunum í hesi byggisamtykt kann byggivaldið geva loyvi til, um so er, at dámur á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur av teirri orsøk.

*Stk. 2.* Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir samtykt býráðsins og góðkenning landsstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.

| FISKIMÁLARÁÐIÐ | |
|---|---|
| Mál nr.: | 14/00486 |
| Ætlanarskriv: | 26/8-2014 |
| Góðkent: | 23/9-2014 |
| Váttað: | M Poulsen |




| | | | |
|---|---|---|---|
| **Tórshavnar Kommuna**<br>Byggi- og býarskipanardeildin | | | |
| **Heiti:** Broyting av serstøk byggisamtykt fyri øki við Marknagil | | | |
| **Viðmerking:** Broytingaruppskot | | | |
| **Skjal nummar:** | | **Journal nr:** 14/02888 | |
| **Dagur:** 07.05.2014 | **Mát:** | | **Tekna:** MKJ/KF |
| **Rættað:** | | | |